UTTAN ÚR HEIMI

## Hartar Fogh

Sjálvt umk bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, hevur sagt seg styðja Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra í stríðnum um tekningarnar av Muhammed profeti, eru tað ikki allir teir bretsku ráðharrarnir, sum hava somu støðu.

Sambært blaðnum The Guardian hevur Charles Clarke, innanríkisráðharri, sagt á einum almennum fundi, at danski forsætisráðharrin gjørdi eitt stórt mistak, tá hann sýtti fyri at tosa við sendiharrarnar hjá tíggju muslimskum londum, sum fegnir vildu tosa við hann um tekningarnar og avleiðingarnar av teimum. Sambært blaðnum segði Clarke, at hetta hevði ikki hent aðrastaðni og í hvussu er ikki í Bretlandi.

Jack Straw, uttanríkisráðharri, hevur sagt, at hann hevur ikki og fer heldur ikki at finnast at donsku stjórnini í hesum máli, men sambært The Guartdian skal ein talsmaður hjá honum hava sagt, at uttanríkisráðharrin hevur at kalla somu áskoðan sum innanríkisráðharrin.

## Kadima missir undirtøku

Tað stendur á hjá Ehud Olmert og hinum leiðarunum í Kadima-flokkinum at varðveita undirtøkuna uttan Ariel Sharon.


*Ariel Sharon. Flokkurin saknar hann*

Í januar vístu kanningar, at tann nýggi flokkurin fór at fáa 44 umboð í tingið á valinum, sum verður tann 28. mars. Í fyrstani sá tað ikki út til, at flokkurin fór at missa stórvegis, eftir at Ariel Sharon var vorðin sjúkur, men nú vísir tað seg kortini at gera mun. Tann seinasta kanningin, sum bleiv almannakunngjørd týsdagin, gav Kadima 37 av teimum 120 tingsessunum.

Flokkurin er kortini nógv tann størsti, men eygleiðarar siga, at tess minni hann verður, tess truplari verður hjá hjá Ehud Olmert at skipa eina arbeiðsføra stjórn.

## Pinkubarn lá í mosku

Løgreglan í Stockholm leitar nú eftir foreldrunum hjá einum pinkubarni, sum bleiv funnið í einari mosku í Stockholm í gjár.

Mahmoud Aldebe úr muslimska samfelagnum sigur við Aftonbladet, at á bønarfundinum í gjár kom ein ung kvinna inn í moskuna á Medborgarplatsen. Hon hevði eitt lítið barn við sær. Lítla løtu seinni segði kvinnan, at hon hevði gloymt eitt ella annað uttanfyri, og at hon mátti fara eftir tí. Men hon kom ikki aftur. Undir liðini á barninum funnu hini ein pappírslepa frá mammuni, sum skrivaði, at hon var boydd at fara frá barninum.

Løgreglan í Stockholm sigur, at tann lítla smágentan er bara nakrar fáar dagar gomul, men at hon hevur tað gott. Sambært Mahmoud Aldebe hava fleiri húski longu boðið sær til at taka sær av gentuni. Ímeðan leitar løgreglan eftir foreldrum hennara.

## Funnið ókent skeljadjór

Franskir granskarar hava funnið eitt higartil ókent skeljadjór á 2300 metra dýpi í Kyrrahavinum.

Djórið líkist einum hummara, men tað er hvítt á liti, og tað serliga er, at tað er loðið. Oman á skelini er tað bert, men tað hevur long, ljós hár á øllum beinunum og á teimum báðum klónum. Eitt annað sermerki er, at djórð hevur eingi eygu. Fronsku granskararnir hava givið tí ókenda djórinum navnið „Kiwa hirsuta“, og fyrri partur av orðinum stavar frá guðalæruni hjá fólkinum á teimum polynesisku oyggjunum.

Granskarar komu støðugt fram á ókend djór í havdýpinum, men tað er kortini sjáldan, at teir finna djór, ið víkja so nógv frá øðrum djórum, at tey mugu skrásetast sum serstøk djórasløg, skrivar AP.

# ST skal umskipast

**Kofi Annan, sum fer frá um ársskiftið, mælir til umfatandi broytingar í heimsfelagsskapinum**

ST
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í einari 33 síður langari frágreiðing mælir Kofi Annan teimum 191 limalondunum til at broyta bygnaðin í ST, so felagsskapurin verður førur fyri at hjálpa teimum nógvu milliónunum kring heimin, sum líða av hungri, sjúku, harðskapi ella yvirgangi.

Tað skal í fyrsta lagi gerast við at styrkja leiðsluna í ST, sigur Kofi Annan, og hetta tilmælið er eitt beinleiðis úrslit av einari kanning í fjør, sum avdúkaði bæði svik og veika leiðslu í fleiri liðum. Tað var tí kanska ikki so løgið, at fleiri av teimum fremstu starvsfólkunum høvdu leitað sær inn í salin, tá Kofi Annan legði ætlan sína fyri trygdarráðið, tí fleiri teirra munnu stúra fyri, hvørja lagnu tey fáa, skrivar AP úr New York.


*Kofi Annan mælir til at nútímansgera ST*

Í framløguni legði aðalskrivarin dent á, at nógv er broytt, síðani ST varð stovnað í 1948, og at tað tí er neyðugt at laga felagsskapin soleiðis, at hann er førur fyri at taka sær av teimum avbjóðingum, sum tann nýggja øldin hevur við sær.

USA hevur leingi kravt broytingar í ST-bygnaðinum, og amerikanska stjórnin hevur longu sagt, at hon tekur undir við ætlanini hjá Annan. Tað sama sigur ES.

# Dømdur til samfelagstænastu

*Ein dómstólur í New York gjørdi í gjár av, at tann kendi sangarin Boy George skal gera samfelagstænastu í fimm dagar, tí hevði givið løgregluni eina falska fráboðan um innbrot heima hjá sær. Boy George viðgekk seg sekan. Hann var eisini ákærdur fyri at hava havt rúsevni, men tann ákæran bleiv slept. Á myndini er tann kendi sangarin á veg úr dómhúsinum aftan á úrskurðin.*



# Nýtt demokrati í Ermasundi

**Í næstan 450 ár hava jarðareigararnir stýrt lítlu oynni Sark, men nú skal hon skipast sum demokrati.**

UMSKIPAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað avgjørdu tey umleið 600 fólkini, sum búgva á oynni, á einari fólkaatkvøðu í gjár.

Jennifer Cochrane var ein av teimum, sum vóru á fólkaatkvøðu, og hon sigur við AP-tíðindastovuna, at tann gamla skipanin hevur virkað væl, men at hon kortini hevur elvt til trupulleikum hjá teimum, sum hava keypt sær jørð á oynni.

– Í veruleikanum snúði tað seg um at forða fyri, at alt skuldi standa í stað, og hetta er eitt stórt framstig. Okkum tørvar ikki eina kollvelting, men nýskipanir, sigur Jennifer Cochrane.

Sark, sum vit kenna frá Oyggjaleikunum, er einar 18 fjórðingar úr fronsku strondini og partur av Ermasundsoyggjunum saman við Guernsey og Jersey. Oyggin er undir bretsku krúnuni, men er kortini ikki ein partur av Bretlandi. Sark er fimm kilometrar long og hálvan triðja kilometur breið.